FRÓÐSKAPARSETUR FØROYA

VITAN ER PALLURIN FORVITNI ER DRÍVMEGIN

# Vitan og Vøkstur

## Yvirskipaði granskingarpolitikkur Føroya

- Staðfestur av Føroya Vísindaráði 28 januar 2011
- **§2a** Føroya Vísindaráð orðar yvirskipaða granskingarpolitikk Føroya við felags hugsjón, sum fevnir um gransking, menning og nýskapan.
- Stk. 2. Í vísindaráðnum eru: løgmaður, landsstýrismenninir í ávíkavist granskingarmálum, vinnumálum, innlendismálum, fíggjarmálum, fiskivinnumálum og heilsumálum, eitt umboð tilnevnt av Føroya Arbeiðsgevarafelag, eitt umboð tilnevnt av løntakarafeløgunum, eitt umboð tilnevnt av Fróðskaparsetri Føroya og tvey umboð fyri sektorgranskingarstovnar. Harumframt kann løgmaður tilnevna upp til 2 ráðslimir.

# Vitan og Vøkstur

## Yvirskipaði granskingarpolitikkur Føroya

- *Styrktir karmar fyri føroyskari gransking*
  - Fróðskaparsetur Føroya miðdepil fyri útbúgving og gransking
  - Samstarv við granskingarstovnar heima og altjóða
  - Felags arbeiðsumhvørvi

- *Dygg og støðug granskingarfígging*
  - Langtíðarráðlegging og kendar karmar
  - Styrkja fíggjarkarmarnar

- *Raðfesting av granskingarøkjum – ?*
  - Raðfesta í minsta lagi 5 granskingarøki
  - Hendan raðfesting skal kjølfesta yvirskipaða granskingarpolitikkin og skal speglast í játtanunum til granskingarstovnarnar og í kappingarpuljum í Granskingargrunninum

FRÓÐSKAPARSETUR FØROYA

# Vitan og Vøkstur

## Fróðskaparsetur Føroya í dag !

- Læraraskúlin, Sjúkrarøktarfrøðiskúlin, Føroyamálsdeildin, Náttúruvísindadeildin, Søgu og samfelagsdeildin
- 516 fulltíðarlesandi, 41 parttíðarlesandi, 5 Ph.D lesandi
- Uml 110 starvsfólk
- Lóg frá 2008: Bachelor, Master, Ph.D, dagførd lóg er ávegis
- Altjóða viðurkenning, Bologna, uttanhýsis meting av setrinum
- Fróðskaparsetrið er í broyting og í vøkstri, ynski er t.d. um:
  - Fleiri lesandi
  - Økt samstarv við granskingarstovnar heima og altjóða
  - Læring hjá vaksnum (lívlanga læring)
  - Fjarlestur, e-learning, nýmótans tøkni
  - Mobilitet og fleksibilitet fyri lesandi og starvsfólk

# Vitan og Vøkstur

## Lóg um Fróðskaparsetur Føroya

- Grein 2 sigur m.a. : *Endamálið er at grunda alla frálæru á gransking og veita frálæru á hægsta altjóða stigi. Stovnurin skal tryggja samanhang millum gransking og útbúgving og tryggja samfelagsligar raðfestingar og fyrilit í hesum sambandi. Raðfestingarnar av uppgávunum skulu støðugt eftirmetast. Stovnurin skal breiða út kunnleika og eggja til orðaskifti um vísindalig háttaløg, ástøði og úrslit.*

- Granskingarpolitikkurin staðfestur: *Umhvørvi fyri útbúgving og gransking verður savnað við einum sterkum Fróðskaparsetri Føroya sum nátúrligur miðdepil og samstarvsfelaga*

# Fróðskaparsetur Føroya

## Hvar fara vit --

- Nýggjur bygnaður setast í verk við 2 megindeildum:
  1. Megindeildin fyri hugvísindi, samfelagsvísindi og námsvísindi
  2. Megindeildin fyri náttúrúvísindi og heilsuvísindi

- Endurskoða og raðfesta granskingarøki og útbúgvingartilboð
- Leggja eina langtíðarætlan fyri menning av Fróðskaparsetri Føroya
- Undirvísing skal vera granskingargrundað
- Styrkja samstarv við aðrar vitanarstovnar og vinnulív.
- Fremja útveksling av vitan, lesandi og starvsfólkum – > økta førleikamenning og vitanarspjaðing.
- Taka nýmótans tøkni í brúk
- Birta undir nýskapan
- Góðskutryggja útbúgving og gransking
- Luttaka í altjóðagerðini og marknaðarføra okkum sum eitt dygdargott lestrar- og granskingarumhvørvi staðsett í Føroyum

# Granskingarpolitikkurin

## Implementering ?

- Stuðlar undir virksemi Fróðskaparsetursins
- Umráðandi at seta í verk átøk til at fremja politikkin
- Byrja við at skapa konsensus millum aktørar um hvussu politikkurin kann/skal fremjast
- Seta neyv mál og tíðarætlanir og skipa fyri eftirmeting
- Raðfesting av granskingarøkjum má viðgerast breitt
- Fíggjarligu karmarnir mugu fylgja við